# Hví skal fólkaskúlin allur, sum hann er, leggjast út til kommunurnar?




ELSA BIRGITTA P. PETERSEN
OG ESMAR BERG

Fyri umleið 60 árum síðani umsótu kommunurnar alt fólkaskúlaøki, men tað var so lágt raðfest av kommunustýrunum tá, at fólk, sum sóu, hvussu fólkaskúlin varð misrøktur, heittu á myndugleikarnar um at taka undirvísingarpartin og læraralønirnar og viðurskifti læraranna frá kommununum og flyta tað til landsmundugleikarnar. Tað varð so gjørt.

Tær føroysku kommunurnar hava síðani havt ábyrgd av bygningum, flokshølum, fakhølum og undirvísingartilfar o.ø. karmum.

Tær føroysku kommunurnar hava nú sum fyrr skyldu til at røkja hetta øki.

Men tað verður í flestu kommunum í Føroyum raðfest lágt.

Tó, nakrar av teimum størstu kommununum eru tvey tey seinastu árini farnar at hyggja til fólkaskúlarnar, nú rammurnar eru farnar at detta niður um oyrini á næmingum og lærarum í so stóran mun, at tað er skomm.

Men hesi nøgvu seinastu árini hevur tað, sum hevur itið fólkskúlin, also bygningar og tilfar, ligið sum ein ruin, í so gott sum øllum kommunum í landinum.

Onkrar eldsálir hava tó av og á sett fólkaskúlan á dagsskrá. Tað sæst í einstøkum bygdum í Føroyum. Men tá tær eru burtur, verður alt tað sama aftur.

Hví hava kommunurnar ikki passað tað, sum teirra skylda hevur verið?

Hví hava kommunurnar ikki tikið ávaringarnar frá teimum, sum hava sæð hetta forfallið og hava ávarað um hetta, í álvara?

Vit vildu fegin havt eina undirbygda frágreiðing frá t.d. Rósu Samuelsen, bygdaráðsformanni, Heðin Zachariassen, bygdaráðsformanni og landsstýrismanni og øllum teimum, sum kropp á kroppi hesa seinastu tíðina hava kravt, at fólkaskúlin skal leggjast út til kommunurnar, tí: ,sitat, "so verður hann nógv betur".

Vit spyrja: "Hví hevði alt blivið so nógv betri? Og hvat hevði verið betri? Og hvat er tað, sum er atvoldin til, at tykkara ábyrgdarøki ikki er blivið røkt, men um tit bara fáa læraralønirnar og alt tað, sum fylgir við teimum yvirum borðið, "so verður alt betri"?

**Hetta er støðan í føroysku kommununum:**
Gamlir og ótíðarhóskandi skúlar.
Ótíðarhóskandi floks- og fakhølir.
Alt ov lítið undirvísingartilfar, og nógv av tí, sum er, er alt ov gamalt, slitið, ja, og ónýtiligt. Brúkt av fleiri ættarliðum av næmingum. Bøkur, kort, teldur, alis/evnafrøðihølir, náttúru og tøkni hølir, skúlakøkar, evnisstovur og smíðhølir, bókasøvn alt gamalt og ótíðarhóskandi.
Ongi arbeiðsrúm til næmingar og lærarar, Ongi matarhølir og ítróttarumstøðurnar vánaligar, Skúlagarðar og spæliplláss eru tómar fløtur.

Ja, vit kundu nevnt nógv meira.

Alt hetta er misrøkt av kommununum í Føroyum.

Hví verður tað ikki gjørt, áðrenn man vil hava ábyrgdina av størri øki, at misrøkja, kanska??

Hóast seinastu 10 árini hava verið sera góð fíggjarliga hjá kommununum, er støðan tó vánalig hjá skúlunum. Hvussu verður hon so, tá tað fer at ganga skeiva vegin?

Vónandi fáa vit svar upp á henda spurning.

Men vit mæla føroysku kommununum fyrst at bøta um tað, sum longu nú er tykkara øki og hevur verið tykkara ábyrgd alla hesa og seinastu øld.

Hvalba 6. januar 2008




# Meirilutin á Sandi fremur "útdoyggjapolitikk"

HANS MEINHARD MIDJORD
stjóri í SETTLERS

Í gjár undirskrivaði meirilutin í Sands Kommunu, við Páll á Reynatúgvu á odda, sáttmála við fyritøku norðanfjørs um bygging av nýggjum barnaskúla á Sandi.

Tað løgna við hesum sáttmála uppá umleið 9 mió. krónur er, at stórsta privata fyritøkan á Sandi, Sp/f Settlers, sum fæst við at smíðja hús, als ikki fekk møguleikan at bjóða upp á arbeiðið, hóast fyritøkan hevur 14 mans í arbeiði, herav 4 lærningar av Sandoynni.

Henda løgna framferð av meilutanum, ikki at bjóða arbeiðini út, er ikki ókend. Tí mæli eg til at stig vera tikin beinanvegin til at støðga hesi niðurbrótandi handfaring av fyritøkunum á Sandi. Tað eru fleiri aðrar fyritøkur á Sandoynni sum eisini eru vónbrotnar av hesi handfaringini av skattaborgarans pengum, sum møguliga kundi komið borgarnum á Sandi til góðar.

Hóast stórsta fyritøka á Sandi, so er Sp/f Settlers ongantíð biðin um at gera nakað arbeiði fyri kommununa.

Tað er sera hugstoytt, at ein meiriluti í kommununi ger sáttmálar við fyritøkur aðrastaðni, uttan at vit fáa møguleikan at bjóða. Hetta ger, at útlitini til fleiri arbeiðspláss í oynni ikki eru góð. Hervið eru eisini útlitini til trivna og mening sera lítil. Her hjálpir ongin tunnil.

Sum fyritøka mótmælir Settlers harðliga hesi vanvirðisligu framferð hjá meirilutanum, sum er við til at vit sum fyritøka sjálvandi mugu umhugsa møguleikarnar at flyta av Sandi, sum aðrar fyritøkur eisini longu hava gjørt.

Flakavirkð á Sandi er nú mest sum afturlatið og seinast skipið og fiskiloyvi stendur nú til søli, so tá ið kommunan á slíkan hátt vanvirðir lokalu arbeiðsgevarnar er lítil vón um vaksandi virksemi. Tí eru framtíðarvónirnar fyri arbeiðsplássum og trivnað í hjá borgarnum á Sandi ikki góðar við verandi meiriluta.

Sandur 7. januar 2008

# Grovar ákærur móti MBF

*Nevndin í Miðvágs Badmintonfelag – MBF*

**Rættleiðing og viðmerkingar til blaðgrein í Dimmalætting 27. desember 2007 um, at Miðvágs Badmintonfelag misnýtir navnið MBF og ger sær dælt av teimum brekaðu í Føroyum!**

**Miðvágs Badmintonfelag (MBF)**
Miðvágs Badmintonfelag – stytt MBF - varð stovnað tann 10. oktober 1963 og hevur frá byrjan av bæði sjálvt brúkt hesa styttingina, og eisini alment verið kent sum MBF. Hetta kann váttast av stovnarunum av felagnum, nevndunum og limunum upp ígjøgnum tíðirnar, ja, av øllum badmintonspælarum og áhugaðum í Føroyum. Felagið er harumframt eisini skrásett og alment viðurkent hjá bæði ÍSF (Ítróttarsambandi Føroya) og BSF (Badmintonsambandi Føroya) við heitinum MBF. Fjølmiðlarnir, og herundir eisini Dimmalætting, hava somuleiðis altíð nýtt hesa stytting um felag okkara, tá teir hava borið tíðindir um badminton.

Miðvágs Badmintonfelag hevur støðugt verið – og er framvegis - eitt aktivt ítróttarfelag við fleiri enn 100 limum, harav 95% eru børn í aldrinum 5-17 ár. Felagið hevur upp ígjøgnum tíðina átt fleiri føroyameistarar, og allir leikarar felagsins vita ikki um annað, enn at teir hava spælt badminton fyri MBF!

**Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum**
Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum varð stovnað tann 24. oktober 1981, t.v.s 18 ár seinni enn MBF. Tá táverandi nevndin í MBF frætti, at nýstovnaða felagið eisini ætlaði sær at brúka styttingina MBF, varð beinanvegin gjørt vart við, at Miðvágs Badmintonfelag brúkti hesa styttingina og hevði gjørt tað líka síðani stovnanina í 1963.

**Skrásetingin av navninum MBF**
Við skrivi, dagfest tann 26. november 2007, fekk Miðvágs Badmintonfelag boð frá Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum um, at meginfelagið er skrásett undir styttingini MBF í Felagsskránni, sum fútin umsitur. Heitt varð í skrivinum á Miðvágs Badmintonfelag um at finna sær eina aðra stytting enn MBF. Miðvágs Badmintonfelag hevur fingið upplýst frá fútanum, at henda skrásetingin ikki er framd fyrr enn tann 18. juni 2007.

Løgfrøðiliga er rættarstøðan tó tann, at Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum ikki við hesi skráseting vinnur sær rætt til at brúka styttingina MBF, tá eitt annað felag støðugt og alment hevur brúkt hesa stytting í 18 ár, áðrenn meginfelagið yvirhøvur varð stovnað, og heili 44 ár, áðrenn meginfelagið av órøttum ger krav uppá styttingina!

At skráseting í felagsskránni ikki hevur avgerandi týdning sæst eisini av, at bara 5 av yvir 100 ítróttarfeløgunum í landinum hava valt at skráseta navn sítt har.

**Kalendarin hjá Miðvágs Badmintonfelag**
Sambært Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum, argast fólk inn á, at Miðvágs Badmintonfelag selir ein kalendara undir navninum MBF. Vit í MBF hava síðani 2003 selt ein fittligan og hentan borðkalendara fyri at fíggja virksemi felagsins (hallarleigu, venjarar, bóltar v. m.). Sølan av kalendarunum er høvuðsinntøkukeldan hjá felagnum, sum – eins og onnur ítróttarfeløg – ikki fáa nakra játtan á Løgtingsins fíggjarlóg. Á kalendaranum standa orðini "MBF" (sum vit hava itið nú í 44 ár) saman við búmerki okkara (Vágoynni, einum badmintonketsjara og einum badmintonbólti). Hvussu kann hetta misskiljast við Meginfelag teirra Brekaðu og sigast at vera misbrúk av teimum brekaðu í Føroyum? At summi fólk kanska ikki hava vitað av, at MBF altíð hevur staðið fyri Miðvágs Badmintonfelag, og hesi tí av misgáum ella óansni hava hildið seg stuðla Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum við at keypa ein MBF-kalendara, kann á ongan hátt rættvísgera ta sera ljótu og órættvísu viðferð, sum Meginfelag teirra Brekaðu og Dimmalætting bóru øllum Føroya fólki sum høvuðstíðindi millum jól og nýggjár.

**Blaðgreinin í Dimmalætting**
Miðvágs Badmintonfelag skilir væl, um tey, sum lósu greinina – ella bara yvirskriftina - í Dimmu hava fingið ta fatan, at Miðvágs Badmintonfelag misnýtir navnið hjá øðrum og ger sær dælt av teimum brekaðu í Føroyum. Men tey mongu, sum altíð hava kent sonnu søguna aftan fyri navnið MBF, og tey, sum nú kenna rætta samanhangin, mugu ásanna, at forkvinnan í Meginfelag teirra Brekaðu gjørdi eina sera ljóta gerð ímóti okkum í MBF, eins og Dimmalætting vísti óvanliga vánaligan blaðsið við at loyva einari tílíkari grein at koma í blaðið, uttan yvirhøvur at hava lýst málið á ein nøktandi hátt. Og um tað ikki longu er eyðsýnt fyri øllum, so skal her verða sligið rimmarfast, at Miðvágs Badmintonfelag hvørki hevur vilja, orsøk ella tørv á at misnýta ella gera sær dælt av teimum brekaðu, sum frammanundan hava nóg trupul kor at virka undir í Føroyum. Tvørturímóti munnu flestu limirnir í okkara felag – íroknað nevndin – hava keypt sær ein Javna-kalendara einans fyri at stuðla arbeiðnum hjá Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum.

Umframt at grovu og órættvísu skuldsetingarnar harma og særa okkum í MBF almikið, so kann hesin órættur eisini í ringasta føri forkoma inntøkugrundarlagnum og harvið eksistensinum hjá felagnum, um vit nú skulu fordømast og fíggjarliga revsast fyri at hava selt kalendarar undir tí navninum, sum vit av røttum hava virkað undir nú í 44 ár.